HEILSU- OG INNLENDISMÁLARÁÐIÐ

4. juli 2017
Mál: 17/00445-3
Tygara skriv:
Viðgjørt: SP/HiH

**Uppskot til kunngerð um luftdálking frá skipum**

Hoyringsfreistin er ásett til **fríggjadagin 1. september 2017**.

Hjálagt er uppskot til kunngerð um luftdálking frá skipum. Uppskotið er ætlað serliga at avmarka svávuldioxid í royki frá skipum. Hetta verður gjørt við at seta krøv til innihaldið av svávuli í brennioljuni, sum skip brúka. Harafturat eru reglur í kunngerðini um brenning av burturkasti umborð á skipum.

Uppskotið setur, saman við kunngerðum, sum longu eru í gildi, Annex VI til Marpol sáttmálan, um at fyribyrgja dálking frá skipum, í gildi fyri Føroyar. Annex VI snýr seg um luftdálking frá skipum.

Heilsu- og innlendismálaráðið heitti í skrivi hin 15. mai 2017 á Umhvørvisstovuna um at gera uppskot til kunngerð um luftdálking frá skipum, sum setur Annex VI til Marpol sáttmálan í gildi fyri Føroyar.

Ynski er, at Føroyar skuldu hava somu reglur sum okkara grannalond um svávulinnihald í olju fyri skip, sum liggja við bryggju og millum oyggjarnar. Hesar reglur eru strangari enn reglurnar í Annex VI.

Annex VI snýr seg serliga um um hesi evni:

- at fyribyrgja dálking við osonoyðandi evnum,
- at avmarka útlát av NOx,
- at avmarka útlát av SOx (svávul),
- at avmarka útlát av VOC (olju- og gassdamp, serliga fyri tangaskip),
- at avmarka dálking frá brenning av burturkasti umborð á skipum,
- at lond skulu hava móttøkuskipanir í landi, serliga fyri osonoyðandi evni og leivdir frá roykreinsing umborð á skipum,
- at lond skulu tryggja, at olja, sum lýkur krøvini í annex VI er tøk.

Sum omanfyri nevnt inniheldur uppskotið til kunngerð reglur um svávul í olju, sum verður brúkt umborð á skipum og um brenning av burturkasti umborð á skipum.

Í kunngerð nr. 118 frá 16. desember 2010 um ozonoyðandi evni eru reglur, sum seta reglu 12 í Annex VI í gildi, og er hetta tí ikki við í uppskotinum.

Eirargarður 2 • FO-100 Tórshavn
Tel: +298 304050 • Fax: +298 304025 • E-mail: himr@himr.fo

Útlát av NOx verður avmarkað við at seta krøv til motorar umborð á skipum. Hesi verða sett av Sjóvinnustýrinum, og eru tí ongar ásetingar um NOx í uppskotinum.

Útlát av VOC er serliga aktuelt fyri oljutangaskip í oljuterminalum, og verður ikki mett, at tørvur er á slíkum reglum í Føroyum í løtuni.

Í kunngerð nr. 20 frá 8. apríl 1987 um móttøkuskipan av oljurestum og -blandingum, kloakkavlopsvatni og burturkasti í føroyskum havnum eru reglur um, at havnir skulu hava móttøkuskipanir fyri ymisk sløg av burturkasti. Mælt verður til, at kunngerðin verður dagførd, so hon lýkur krøvini í Annex VI.

Mett verður ikki, at tørvur í løtuni er á at lóggeva um, at olja, sum lýkur krøvini í Annex VI skal vera tøk í Føroyum

Heitt verður á hoyringspartarnar um at lata **Heilsu- og innlendismálaráðnum**, t.e. himr@himr.fo møguligar viðmerkingar til hjálagda uppskot í seinasta lagi **fríggjadagin 1. september 2017**. Hoyringspartarnir eru eisini vælkomnir at boða frá, um ongar viðmerkingar eru til uppskotið.

Kunngerðauppskotið liggur eisini tøkt á heimasíðuni www.himr.fo

Vegna Heilsu- og innlendismálaráðið

Hilmar Høgenni
deildarstjóri